**Suðuroyar Sjúkrahús**
www.ssh.fo ssh@ssh.fo
tlf. 34 33 00 fax. 37 10 10

**Um tú ikki kanst møta ásettu tíð, verður tú vinarliga biðin at ringja tlf. 34 33 00 lokal 3227.**

# *Gastroskopi*



## Hvat er gastroskopi?

Gastroskopi er ein kanning, ið verður gjørd av maganum.

Eitt gastroskop er ein tunn liðilig slanga á tjúkd við lítlafingur, ið verður førd gjøgnum munnin niður í magan. Gastroskopið er útgjørt við einum "kikara" í endanum, so læknin sær broytingar í vælindi, maga og buggørnum/tólvfingurtarmi.
Um neyðugt, kann kyknuroynd takast gjøgnum gastroskopið.

## Fyrireikingar til kanningina.

Dagin fyri kanningina kanst tú eta vanligan mat.

**Aftaná kl. 24.00 skalt tú fasta, t.v.s. tú skalt ikki eta, drekka ella roykja.**

## Heilivágur.

Nýtir tú heilivágspístr fyri astmu, skalt tú hava tað við tær á sjúkrahúsið.

Nýtir tú insulin, skalt tú seta teg í samband við okkum dagin fyri kanningina á tlf. 34 33 00 lok. 3210.

## Kanningin.

Tú skalt møta í bíðirúminum við leiðbeiningina/telefonvekslaran og siga starvsfólkinum har, at tú ert komin.

Tú fært eina song at liggja í, og ein sjúkrarøktarfrøðingur leggur kanylu í eina æðr á handarbakinum.

Tú fært doyvandi heilivág í æðrina, meðan kanningin er.

Tú merkir onga pínu, men av tí at luft verður blást gjøgnum gastroskopið niður í magan, kanst tú merkja trýst um flagbróstið, fara at ropa og spýta.

Kanningin tekur umleið 5-10 min.

## Aftaná kanningina.

Aftaná kanningina verður tú liggjandi í songini, til tú ert komin fyri teg.
Áðrenn tú fert heim, fært tú at eta og drekka.
Ert tú innlagdur/innløgd, fert tú aftur á deildina eftir kanningina.

**Bilkoyring.**
Av tí at tú hevur fingið doyvandi heilivág, skalt tú ikki koyra bil fyrr enn 12 tímar eftir kanningina.

**Kanningarúrslit.**
Áðrenn tú verður útskrivað/-ur, greiðir læknin tær frá úrslitinum av kanningini.

Er kyknuroynd tikin av rovuni, er svarið klárt eina til tvær vikur eftir kanningina.
Avtalað verður, hvussu tú fært svarið.

**Eitthvørt at spyrja um?**
Eru ivamál, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum á tlf. 34 33 00.

Vinarliga

Suðuroyar Sjúkrahús

august 2019